Hans Engell, blaðstjóri á Ekstrablaðnum:

# Ríkisfelagsskapurin onga framtíð í verandi líki

**Hans Engell, fyrrverandi politikari í Danmark, legði ikki fingrarnar ímillum, tá hann gjørdi støðuna í ríkisfelagsskapinum upp. Hann hevur onga framtíð í verandi líki. Danir mugu gera upp við seg sjálvar, hvat teir í veruleikanum vilja við felagsskapinum**

RÍKISFELAGSSKAPURIN
*Stefan í Skorini*

**Keypmannahavn:** Hósdagin var ráðstevna í felagssalinum í danska Fólkatinginum. "Er nøkur framtíð í ríkisfelagsskapinum?" var uppleggið frá fyrireikarunum, sum var Norðuratlantsbólkurin á Fólkatingi.

Ein av fyrstu røðarunum var Hans Engell. Hann svaraði beinanvegin spurninginum noktandi.

- Ríkisfelagsskapurin hevur onga framtíð í verandi líki. Tað eru heilt greiðar ábendingar um, at Føroyar og Grønland bæði vilja hava størri frælsi í felagsskapinum og vilja virka á jøvnum føti við onnur lond og onnur fólk. Tí mugu danskir politikarar taka tær røttu avgerðirnar, áðrenn sambandið millum londini versnar enn meira, segði Hans Engell.

Engell hevur fyrr verið ein av fremstu politikarunum í Danmark. Í áttatiárunum var hann verjumálaráðharri, og seinni var hann løgmálaráðharri í stjórnini hjá Poul Schlüter. Síðan gjørdist hann formaður í Konservativa flokkinum, áðrenn hann tók seg aftur í 1997.

Nú situr hann aftur í einum heitum stóli. Hans Engell er í dag blaðstjóri á Ekstrablaðnum, sum er við til at skapa danska kjakið.

### Ein uppgerð krevst

Hans Engell legði dent á, at danir mugu gera upp við seg sjálvar, hvat teir í veruleikanum vilja við ríkisfelagsskapinum við Føroyar og Grønland.

- Vilja danir nakað við ríkisfelagsskapinum? Um svarið er ja, hvat er hetta nágreiniliga, spurdi Hans Engell. Danmark skal ikki tosa við føroyingar, sum vóru teir undirsáttar hjá dønum, men hinvegin er respektin fyri hvørjum øðrum avgerandi, segði fyrrverandi toppolitikarin á áhugaverdu ráðstevnuni.

Hinvegin vísti hann á, at tað eru Føroyar og Grønland, sum skulu avgera, um ríkisfelagsskapurin skal avtakast.



*Svend Auken, fyrrverandi formaður hjá Socialdemokratunum, vil heldur enn fegin, at Føroyar og Grønland halda fram í ríkisfelagsskapinum*

Hans Engell segði seg ikki skilja støðuna hjá donsku stjórnini, at Føroyar og Grønland kunnu fáa blokkstuðul í óavmarkaða tíð, so leingi tey vilja vera verandi í felagsskapinum, men so skjótt londini vilja hava størri sjálvstýri, so er stuðulin sera avmarkaður. Hví danskar stjórnir hava slíka stívrenda støðu, skilir blaðstjórin als ikki.

Hans Engell legði afturat, at hann væntaði, at føroyingar og grønlendingar kunnu vænta sær 10-20 prosent lægri livistøði, um blokkstuðulin hvørvur.

Hann vísti hinvegin á, at tá Poul Nyrup Rasmussen, fyrrverandi forsætisráðharri, førdi tann beinharða politikkin mótvegis Føroyum undir sjálvstýrissamráðingunum, fekk hann stuðul frá Fólkatinginum og danska fólkinum.

### Ríkisfelagsskapurin lítlan áhuga í Danmark

Sum blaðstjóri fylgir Hans Engell væl við í, hvat rørist í danska fólkinum. Hann segði, at meðan kjakið um ríkisfelagsskapin fyllir sera nógv í føroyskum og grønlendskum fjølmiðlum, so fær hann sera lítið pláss í donskum miðlunum.

Hetta vísir, at danir ikki geva ríkisfelagsskapinum eins stóran ans sum grønlendingar og føroyingar.

Hans Engell endaði við at siga, at felags mugu londini í ríkisfelagsskapinum finna eina nýggja leið, so at allir partar eru nøgdir, um felagsskapurin skal hava nakran framtíðar møguleika. Hann legði afturat, at 600 ára felagsskapur ikki verður kvettur eftir einum degi, og at tjóðskaparspurningurin eftir hundrað ára togtogan framvegis býtir tað føroyska fólkið í tvær krígslegur.

---

Svend Auken, fólkatingslimur:

# Vil helst hava felags framtíð

**Svend Auken ivast ikki í, at tað ber til hjá Føroyum, Grønlandi og Danmark at virka saman sum trý sjálvstøðug lond í einum felagsskapi**

RÍKISFELAGSSKAPURIN
*Stefan í Skorini*

- Føroyingar og grønlendingar kunnu velja eina felags framtíð saman við Danmark í ríkisfelagsskapinum, ella kunnu teir velja tann íslendska leistin, har samstarvið millum Danmark og Ísland nú er sera avmarkað fyri ikki at siga einki, segði Svend Auken á ráðstevnuni á Christiansborg hósdagin.

Svend Auken, sum er fyrrverandi formaður hjá Socialdemokratunum, var annar av innbodnu røðarunum, ið høvdu orðið hósmorgunin.

Hann var sannførdur um, at Føroyar, Grønland og Danmark kunnu finna eina felags framtíð, har tað eru trý sjálvstýrandi lond í einum felagsskapi. Soleiðis hevur ríkisfelagsskapurin sambært Svend Auken eina framtíð.

Fólkatinglimurin vísti á, at har vóru nakrar fíggjarligar og tekniskar forðingar, men hann ivast tó ikki í, at hetta letur seg gera við góðum vilja frá øllum pørtum. Hann duldi ikki fyri, at hansara størsta ynskið var, at londini halda fram í felagsskapinum.

### Øll gerast fátækari

Hann vildi vera við, at øll londini gerast fátækari, um vit brádliga halda í hvør sína ætt. Øll londini í felagsskapinum hava nakað at bjóða hvørjum øðrum, og hetta vil Danmark halda fast um.

Svend Auken vísti á, at hóast londini hoyra til sama ríki, so er tað bara Danmark, sum er við í Evropa Samveldinum. Henda skipan hevur virkað uttan stórvegis trupulleikar, og hetta prógvar, at Føroyar og Grønland kunnu hava eina aðra støðu enn Danmark í fleiri týðandi málum.

Auken endurtók, sum vit hava hoyrt fyrr, at Føroyar og Grønland hava fría atgongd til heilsuverkið og hægri lærustovnar í Danmark, meðan Danmark somuleiðis hevur atgongd til bæði hini londini.

Svend Auken segði tað vera sera hugstoytt at síggja, hvussu amerikaniseraðir íslendingar eru blivnir á politiska og mentanarliga økinum, síðan landið tók sjálvstýri fyri meira enn hálvthundrað árum síðani. Eitt slíkt rák vil hann helst ikki síggja í Føroyum og Grønlandi, og tað kann fyribyrgjast, um londini halda fram í felagsskapinum.



# Lættari at fáa endurgjald aftan á skipsvanlukkur

**Í framtíðini verður tað lættari at krevja endurgjald aftan á skipavanlukkur, og endurgjaldið hækka eisini**

SKIPAFERÐSLA
*Árni Joensen*



*Aftan á eldsbrunan umborð á ferjuni "Scandinavian Star" fyri tólv árum síðani vóru tað fleiri, sum vístu á, at tað var alt ov trupult hjá ferðafólkinum og avvarandi hjá teimum, sum doyðu, at krevja ábyrgdarpersónarnar drignar til svars og at krevja endurgjald fyri missin*

Aftan á eldsbrunan umborð á ferjuni "Scandinavian Star" fyri tólv árum síðani vóru tað fleiri, sum vístu á, at tað var alt ov trupult hjá ferðafólkinum og avvarandi hjá teimum, sum doyðu, at krevja ábyrgdarpersónarnar drignar til svars og at krevja endurgjald fyri missin.

Men nú skulu viðurskiftini broytast.

Á einari diplomatráðstevnu í London í vikuni var semja um at broyta galdandi altjóða reglur, sum viðvíkja endurgjaldi, tá talan er um eina vanlukku við einum ferðamannaskipi.

Vanlukkan við "Scandinavian Star", sum kravdi 159 mannalív, var í 1990, men aftan á ráðstevnuna í London er greitt, at vanlukkan kortini kann takast upp til kanningar av nýggjum. Samstundis hevur vanlukkan havt ta altjóða ávirkan, at nú skulu reglurnar um endurgjald til ferðafólk og avvarandi broytast.

### Athen-samtyktin

Reglurnar, sum higartil hava verið galdandi, standa í teirri sonevndu Athensamtyktini, men hon verður nú broytt.

Ein nýggj týðandi broyting er, at tey, sum krevja endurgjald aftan á eina vanlukku við einum ferðamannaskipi, skulu ikki longur rættarsøkja reiðaríinum, men heldur tryggingarfelagnum hjá skipinum. Hetta fer m. a. at bera í sær, at skuldi reiðaríið farið á húsagang, missa fólk ikki rættin til endurgjald.

Tryggingarfeløgini, sum tryggja ferðamannaskip, vildu fegin varðveita ta gomlu skipanina, men tey noyðast nú at broyta sínar tryggingartreytir og -reglur fyri ferðamannaskipini, soleiðis at hesar tryggingar fara at líkjast vanligum ábyrgdartryggingum.

Á ráðstevnuni í London vóru tryggingarfeløgini sum vera man heldur ikki serliga hugað fyri at hækka hámarkið fyri, hvussu nógv fólk kunnu krevja í endurgjaldi. Higartil hevur mestamarkið verið 1,75 millión krónur, men tað verður nú hækkað til 2,5 milliónir krónur. Kortini kann kravið koma upp í fýra milliónir krónur, um tað kann prógvast, at reiðaríið hevði skyldina av vanlukuni.

### Ymiskur áhugi

Formaður fyri ráðstevnuni í London, sum endaði í gjár, var varastjórin í norska vinnu- og handilsmálaráðnum, Gaute Sivertsen, og hann er fegin um, at tað eydnaðist at broyta galdandi reglur.

Gaute Sivertsen heldur tað vera serliga týdningarmikið, at fólk nú kunnu krevja endurgjald frá tryggingarfelagnum heldur enn reiðarínum. Hann heldur eisini, at hetta saman við tí hækkaða mestamarkinum fer at gera tað lættari hjá ferðafólki og avvarandi at fáa endurgjald.

Á ráðstevnuni í London vóru fleiri lond ímóti broytingunum, og tí er spurningurin, hvussu mong lond fara at staðfesta tær nýggju reglurnar. Viðtøkurnar hjá IMO siga, at minst 10 lond skulu staðfesta broytingarnar, fyri at tær kunnu fáa gildi, og Gaute Sivertsen væntar, at tað fer at eydnast. Hann vísir í hesum sambandi á, at ES hevur víst broytingunum stóran áhuga, sjálvt um samveldið ikki hevur sagt seg vera til reiðar at staðfesta tær. Noprski ráðstevnuformaðurin væntar kortini, at tað fer at bera til at fáa 10 lond at skriva undir avtaluna. Eitt nú hava Avstralia og Kanada bent á, at tey fara at staðfesta hana.

---

# Ríkisfelagsskapurin á gravarbakkanum

**Deyðadómur varð hósdagin lýstur yvir ríkisfelagsskapin millum Føroyar, Grønland og Danmark. Hetta hendi á ráðstevnuni hjá Norðuratlantsbólkinum á Fólkatingi, har evnið júst var spurningurin um framtíðina hjá ríkisfelagsskapinum.**

RÍKISFELAGSSKAPUR
*Magnus Dam*

Áhugin fyri Grønlandi og Føroyum er stórur. Eisini tá talan er um eitt tiltak í danska høvuðsstaðnum, fleiri túsund kilometrar uttanfyri Føroyar og Grønland. So stórur var áhugin fyri ráðstevnuni hjá Norðuratlantsbólkinum, at pláss var ikki fyri øllum, sum høvdu hug at hoyra politikkararnar røða um ríkisfelagsskapin. Pláss var bert fyri hálvtannaðhundrað áhoyrarum í Felagssalinum á Christiansborg, og salurin var stúgvandi fullur.

Afturat teimum trimum fólkatingslimunum í Norðuratlansbólkinum, sótu floksformenninir hjá teimum í pallborðinum, og harafturat høvdu fyrireikararnir boðið Svend Auken úr Sosialdemokratiska flokkinum og Hans Engell, blaðstjóra og fyrrverandi ráðharra hjá teimum konservativu at luttaka á ráðstevnuni.

### Merkti orðaskiftið

Lítil ivi er um, at júst hendan samansetingin, at tað bert vóru umboð úr flokkunum í Norðuratlantsbólkinum, sum umboðaðu Føroyar og Grønland, merkti orðaskiftið. Longu í innleiðandi røðu síni, vísti Lars Emil Johansen úr Siumut á, at Norðuratlantsbólkurin ikki sær nakað alternativ til sjálvstýri, og er ríkisfelagssapurin til hindurs fyri hesum, má hann burtur.

Áleið somu støðu høvdu hinir báðir limirnir í Norðuratlantsbólkinum, Tórbjørn Jacobsen og Kuupik Kleist og formenninir í flokkunum hjá teimum báðum, Høgni Hoydal og Josef Tuusi Motzfeldt.

"Hevur Ríkisfelagsskapurin nakra framtíð?", var heitið á ráðstevnuni, men teimum flestu mundi vera greitt frammanundan, at luttakararnir í pallborðinum halda lítið um tann leistin, ríkisfelagsskapurin er innrættaður eftir í dag. Og somu niðurstøðu hava flestallir flokkar í tí sokallaða ríkisfelagsskapinum longu gjørt. Samstarvið millum londini í ríkisfelagsskapinum er ótíðarhóskandi og riggar ikki nóg væl, og tað eigur at verða endurskoðað, halda allir flokkar.

Tann stóri spurningurin er bara, hvussu hetta skal gerast, og har er munur á sjónarmiðunum hjá flokkunum, sum vóru umboðaðir á ráðstevnuni og teimum, sum ikki vóru umboðaðir.

### Einki kegl

Onkur av áhoyrarunum helt, at tað var ov lítil breidd í pallborðinum, og at sjónarmiðini vóru ov lík. Sóknaðist eftir andstøðu ella mótstøðu til sjónarmiðini. Men hesar atfinningarnar kundi Lars Emil Johansen ikki taka til sín. Hetta var ikki nakað "konklusiónsseminar", segði hann, og vísti annars á, at Norðuratlantsbólkurin hevði boðið Lisbeth L. Petersen úr Sambandsflokkinum upp í samstarvið millum fólkatingsumboðini úr Norðuratlantshavi.

Tórbjørn Jacobsen legði afturat, at endamálið við ráðstevnuni júst var at sleppa undan vanliga keglinum, sum myndar kjakið, serliga í Føroyum. Og at fáa nøkur onnur sjónarmið fram, enn tey vit vanliga hoyra, og her hugsaði hann helst serliga um sjónarmiðini hjá Svend Auken og Hans Engell (sí aðrastaðni í blaðnum, blm.), nú hesir báðir ikki longur mynda ein part av donsku stjórnini og eru bundnir av støðuni hjá henni.

Kjakið ella mótspælið, sum var, kom tí mest úr salinum, og nógvir spurningar vórðu settir pallborðsluttakarunum, sum fingu høvi til at greiða frá sínum sjónarmiðum á ein heilt annan og fríari hátt, enn vit eru von við at hoyra í Fólkatingssalinum í sama húsi.

Bert spell, at tað ikki vóru fleiri danskir fólkatingslimir, sum vístu tiltakinum áhuga. Teir vóru allir bodnir, men áhugin var eftir øllum at døma ikki har.

### Sosialu viðurskiftini stóran áhuga

Hóast evnið á ráðstevnuni var ríkisfelagsskapurin, so snúði alt seg ikki um politikk. Sosialu viðurskiftini hjá útisetunum í Danmark, kanska serliga grønlendingum, fingu stóra rúmd, og danski almannamálaráðharrin lovaði á ráðstevnuni, at hon fer at virka fyri at bøta um sosialu viðurskiftini hjá grønlendingum í Danmark.

At tørvur er á hesum vístu tær báðar grønlendsku kvinnurnar Henriette Berthelsen, psykoterapeutur, og Aviaja Helms, sakførari, sannførandi á. Tær fáast nógv við viðurskiftini hjá grønlendingum, sum eru komnir illa fyri í Danmark, og har hjálpir eingin góður ríkisfelagsskapur. Tá teir eru í Danmark, eru grønlendingar danir eins og allir aðrir danir í eygunum á almennu málsviðgerðunum, og tí verður alt ov lítið gjørt við at taka fyrilit fyri serligu støðuni, nógvir teirra eru í.

Tað var skilligt, at nógvir áhoyrarar vóru fegnir um, at hesi viðurskiftini vórðu tikin upp, og Norðuratlantsbólkurin lovaði eisini at gera sítt til at lýsa og bøta um viðurskiftini.

Ráðstevnan hósdagin var tann fyrsta av sínum slag hjá Norðuratlantsbólkinum, men hon verður ikki tann seinasta, lovaðu fyrireikararnir.

## Ídnaðurin rýmir úr Noregi

**Seinastu sjey vikurnar hava 46 norskar fyritøkur koyrt arbeiðsfólk til hús ella boðað frá uppsagnum. Samstundis umhugsa fleiri hundrað fyritøkur at flyta av landinum**

VINNULÍV
*Árni Joensen*

Týsdagin samtykti leiðslan á verksmiðjuni Hjellegjerde, sum ger innbúgv, at flyta ein stóran part av virkseminum til Litava og Teilands. Tað bar í sær, at 75 fólk á virkinum missa arbeiðið.

Men søgan um Hjellegjerde-verksmiðjuna og arbeiðsfólkið har er bert ein av mongum í Noregi í heyst. Frá viku 37 til viku 43 gjørdu 46 fyritøkur av at koyra arbeiðsfólk til hús ella at ávara tey um komandi uppsagnir. Boðini umfata 2.600 arbeiðsfólk.

Samstundis ljóðar, at fleiri hundrað norskar fyritøkur umhugsa at flyta elt sítt virksemi ella meginpartin av landinum.

Stjórin í felagnum hjá norsku tøknifyritøkunum, Knut E. Sunde, segði við blaðið VG mikudagin, at nógvar av teimum fyritøkunum, sum í løtuni umhugsa, hvat tær skulu gera, fara at taka avgerð fyri jól, og sjálvur roknar hann við, at politikararnir fara at fáa ein skelk, tá teir frætta úrslitið.

Fyri einum ári síðani vísti ein kanning, at 60 prosent av teimum fyritøkunum, sum hava meiri enn 50 fólk í arbeiði, vóru til reiðar at flyta av landinum, fall virðið á norsku krónuni ikki. Virðið er tvørturímóti hækkað síðani, og Knut E. Sunde sigur, at vandi er fyri einari sannari ídnaðaraldu av landinum næsta ár.

Í Útflutningsráðnum í Oslo ásanna tey, at støðan er álvarsssom. Har bera tey eisini ótta fyri, at avgerðirnar hjá fyritøkunum at flyta av landinum fara at raka útjaðaraøkini meinast, og at avgerðirnar fara at fáa óhepna ávirkan á aðrar fyritøkur í útjaðaranum.